FØROYA HANDILSSKÚLI
TEKNISKI SKÚLIN
Team 85 • 316511

## Skeið innan
# Plastsveising

**Skeið 1.**
**Heitluft og -extrudersveising í termoplasttilfari.**
Skeiðið er ætla teimum, ið vilja fáa meira kunnleika um at sveisa í termoplasttilfari til framleiðslu ella umvæling eftir háttinum heitluft og -extrudersveising.

**Innihald:**
Plasttilfar - framleiðsla av plasti - eyðmerking - demo av heitluft og -extrudersveising - ymiskur seymur - verkligar uppgávur - eftirlit og royndir - eftirviðgerð.

**Skeið 2.**
**Stuk og -elektrosveising av rørskipanum í termoplast.**
Skeiðið er ætla teimum, ið vilja fáa meira kunnleika um at sveising av plastrørum í samband við nýggj arbeiði ella umvælingararbeiði eftir háttinum stuk og -elektrosveising.

**Innihald:**
Plasttilfar - framleiðsla av plastilfari - eyðmerking - demo og teori av stuk og -elektrosveising - verkligar uppgávur - eftirlit av stuk og -elektrosveising - eftirviðgerð.

**Skeið 1:** 2. oktober 2001
**Skeið 2** 4. oktober 2001
**Stað:** Tekniski Skúli, Smiðjugerði
**Kostnaður:** kr. 1.950,- fyri hvørt skeiði íroknað frálæru, tilfar og mat
**Tilmelding:** **áðrenn 27. september 2001**

*Skeiðini verða hildin treytað av, nóg nógvir luttakarar tekna seg.*
*Nágreiniligir upplýsingar um skeiðinnihald og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til*

**SKEIÐSDEPILIN Á MARKNAGILI * SDM**
Marknagilsvegur 77 • Postrúm 177 • 110 Tórshavn • Tel 31 88 13 • Fax 31 33 74,
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo • Heimasíða http://sth.olivant.fo

# Sethús og jørð
# í Sandavági

Vegna Føroya Skiftirætt verður ognin matr. nr. 73, Sandavágur lýst til sølu.

Ognin verður lýst soleiðis:

Sethúsalutur, 796 m² til støddar. Húsini eru 36 m² í kjallara og miðhædd, loftshæddin er 27 m².

Húsini krevja ábøtur.

Til ognina hoyra 2 jarðarstykki upp á ávikavist 3.169 m2 og 1.615 m2, ið liggja í landbúnaðarøki.

Skiftirætturin skilar sær rætt til at velja millum innkomin tilboð og til ongum at taka av.

Nærri upplýsingar um ognina fáast frá undirritaðu.

**Advokatskrivstovan**
Fríða Patursson, adv.
Fr. Petersensgøtu 9
100 Tórshavn
Tlf. 311145

**Matrikulstovan**
Jónas Broncksgøta 27 · Postboks 327
FO-110 Tórshavn · Tlf. 314533
Fax 310408 · E-mail: post@matrikul.fo

# Máliteknikari

**Starvið**
Starv sum máliteknikari er leyst at søkja.

**Førleiki**
Um tú ert tekniskur assistentur, landmálingsteknikari, matematiskur studentur ella HF'ari við matematik sum valgrein, er hetta kanska eitt starv fyri teg. Tú skalt hava áhuga fyri at arbeiða við tølum og við EDV.

**Setunarviðurskifti**
Lønin verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Royndartíðin er 3 mánaðir.

**Upplýsingar**
Fyrispurningar um starvið kunnu setast Øssur Midjord, stjóra.

**Umsókn**
Umsókn, saman við prógvum og møguligum ummælum, skal sendast til:

**Matrikulstovan**
Postboks 327
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera Matrikulstovuni í hendi í seinasta lagi 1. okt. 2001.

Matrikulstovan er stovnur undir Vinnumálastýrinum. Arbeiðsøkini á stovninum eru matrikulerar broytingar, marknasetingar, útskiftingar, fikspunkt og kortlegging. Á stovninum starvast 18 fólk.

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Starvsdagar

**Hósdagin 27. september kl. 14.00**

verður samkoma á Skúlaheiminum
v/ Marknagilsvegin í samband við at
2 av leiðandi lærarum okkara hava starvsdagar.

**Herluf L. Simonsen,**
hevur undirvíst á Timburdeild skúlans í 35 ár

**og Oddmar Rasmussen,**
hevur undirvíst á Maskindeild skúlans í 30 ár.

**Tekniski skúlin í Tórshavn**

# Lastbil/kranførari søkist

Søkt verður eftir lastbil/kranførara við prógvi at byrja beinanvegin.

**OCD**
Heiðavegur, 600 Saltangará
Tlf. 447200 • Fartlf. 222300

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Leiðari til Býlingshúsið á Ternuryggi

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir leiðara, 40 tímar um vikuna, til Býlingshúsið á Ternuryggi, at byrja 1. november 2001.

Á stovninum eru 40 barnagarðsbørn og 12 vøggustovubørn.

**Setanarviðurskifti**
Sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
við at venda sær til Katrin Petersen, samskipara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 8. oktober 2001.

SNARSKIVAN

veng-føroyar



Plátulutir
Kúfangarir
Kølaragittar
Kølarir
Lyktir
Síðuspegl
Beriarnar
Bensintangar
www.veng.dk

Veng Føroyar
Fo-335 Leynar

Telefon 42 17 67 Telefax 42 17 68 veng@post.olivant.fo

# Ford Puma Coupé frá 18.09.2000



til sølu um hóskandi boð fæst.

Er sera vælhildin, 1 árs eftirlit fylgir við í keypinum, rustviðgjørdur, sera nógva eykaútgerð, (seldur vegna keyp av størri bili.

**Tlf. 216167**
e-mail: pb928ihn@post.olivant.fo



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3238
Navn: Sp/f Eldorado
Adressa: 700 Klaksvík
Kommuna: Klaksvíkar Kommuna
Stovningardato: 14.09.2001
Viðtøkudato: 14.09.2001
Kapitalur: Kr. 100.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 100.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Ólavur Waag Høgnesen, Vágsgeil 10, 700 Klaksvík og Magnus Andreasen, Skúlavegur 9, 700 Klaksvík
Stjórn: Ólavur Waag Høgnesen, Vágsgeil 10, 700 Klaksvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjórnini.
Grannskoðari: : Sp/f Grannskoða Jóannis Skorheim, Klaksvíksvegur 28, 700 Klaksvík.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 14.09.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at reka fiskivinnu og kunningarvirksemi, keyp, søla og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 21. september 2001

Kristin Balle

FLOGFRAKT
SJÓFRAKT
hurð til hurð
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
SAFARI TRANSPORT
www.safari.fo
Tel. 32 22 22
Sosialurin - 311820

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Land Rover Freelander 2,0 LN, 5 hurðar og 5 gear
**Árg.:** 1999
**KM.:** 55.200
**Eyka útgerð:** El-rútar framman, el-sóltak, sentrallás og sportsfelgur.

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Bjartur Brekkstein
tlf. 345600 - lokal 345771 - fartlf. 215771
fax nr. 345607
at hitta millum kl. 08.30–10.00.

# Kunngerð um kirkjuráðsval

Hervið verður kunngjørt, at kirkjuráðsval verður í Argja kirkjusókn, **týsdagin 6. november 2001**. Valið fer fram í Argja Kirkju nevnda dag frá kl. 10-12 og 16-18.

Valevnislistar skulu verða formanninum fyri valstýrinum, Erland Rasmussen, í hendi seinasta lagi **9. oktober kl. 19.00**. Valevnini mega í mesta lagi vera 13 og skulu minst 3 og í mesta lagi 15 veljarar sum stillarar undirskriva listan. Høvuðstreytin fyri valrætti er, at ein og hvør, sum er limur í fólkakirkjuni, og sum fyllir 18 ár í seinasta lagi valdagin 6. november 2001, hevur valrætt. Skilað verður til, at veljast skulu 7 limir í kirkjuráðið.

Krossur verður settur annaðhvørt fyri listan ella fyri **einum** valevni á listanum.

Øll valevni skulu skrivliga geva váttan um, at tey vilja lata seg stilla upp, og hava tey ikki sitið í kirkjuráði áður, at tey eru sinnað at undirskriva tað váttan, sum kravd verður, áðrenn tey á fyrsta sinni kunnu taka sæti í kirkjuráðnum.

Formaðurin fyri valstýrið verður at hitta í **Argja Kirkju 8. og 9. oktober, báðar dagar frá kl. 17.00-18.00; annars á telefon nr. 21 46 99.**

Argir, hin 19. september 2001.

**Valstýrið fyri Argja kirkju**

# Størv í kolvetnisumsiting o.ø.

Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Núverandi setanarøki er Suðuroyar Øki, men fevnir annars um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir teirra, og tey, ið sett verða, skulu kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

**Umsóknir**:
Umsóknir við avriti av prógvi og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrinum, í hendi í seinasta lagi
**15. oktober 2001**

*Toll- og Skattstova Føroya Suðuroyar Øki*
*Postsmoga 69*
*FO 800 Tvøroyri*

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Suðuroyar Øki, eru tvey størv leys at søkja til setan skjótast til ber.

**Arbeiðsuppgávur**
Talan er um fjølbroytt arbeiði, og eru arbeiðsuppgávurnar m.a. skráseting av persónstølum í samband við oljuvinnuna, innkrevjing av gjaldi í samband við barsilsskipanina, umsiting av frítíðarløn og frítíðargrunni, arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum o.a.m. Annars skal viðkomandi altíð vera villigur til at taka sær av øllum teimum uppgávum, sum verða álagdar økisskrivstovuni.

Stórur partur av arbeiðinum er bóking og avstemman av inngjøldum. Tær ymsu skipanirnar hava sín egna roknskap, sum verður grannskoðaður av uttanhýsis grannskoðara. Til arbeiðsuppgávuna krevst eisini at luttikið verður á fundum.

*Arbeiðsuppgávurnar, sum nú liggja í Stýrinum á Argjum, verða fluttar til Tvøroyrar. Stýrið syrgir til fyri neyðugu upplæringini av nýggjum starvsfólkum í samband við at uppgávurnar verða fluttar*

Um so er, at nýggjar ella broyttar uppgávur í hesum sambandi verða álagdar økinum, skal viðkomandi vera villigur at taka sær av teimum.

**Førleikakrøv**
Tey, sum sett verða, skulu hava skrivstovuútbúgving e.l. og helst roknskaparligan kunnleika, vera arbeiðssom, fyrikomandi og duga væl at leggja arbeiðið til rættis. Stórur dentur verður lagdur á, at viðkomandi arbeiðir sjálvstøðugt, er vanur við telduarbeiði, og er førur fyri at mynda avgerðir í dagliga arbeiðinum.

Harafturat skal viðkomandi vera fúsur at luttaka á skeiðum og útbúgvingum, ið Toll- og Skattstova Føroya fyriskipar.

**Vit kunna bjóða**
- eitt spennandi og krevjandi starv við nógvum og fjølbroyttum uppgávum
- flextíð
- eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi

**Løn og setanarviðurskifti**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag.

**Spurningar hesum viðvíkjandi** kunnu setast Mai-Britt Winther, økisstjóra á Toll- og Skattstovu Føroya, Suðuroyar Øki, á tlf. 37 10 51.

Sosialurin

ÍByin
- hvønn hósdag

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

# Maskinsmiðir

Søkt verður eftir maskinsmiðum til ymiskt smiðjuarbeiði, at byrja skjótast gjørligt.

Løn eftir nærri avtalu.

Søkt verður eftir einum lærlingi til maskinsmið, at byrja skjótast gjørligt.

TANGAVIRKIÐ
Tlf. 298 373065 · Fax +298 373934
FO-900 Vágur